

Boring á Grane-boripallinum hjá Statoil. Mynd: Harald Pettersen.

# Oljufeløgini spara - myndugleikarnir óttast fleiri óhapp á norska landgrunninum

**Jógvan Hugo Gardar**

30.09.2014 - 18:36

Oljan.fo

Oljufeløgini leggja átta boripallar, og fleiri túsund starvsfólk missa arbeiði, bæði í sjálvari oljuvinnuni, men ikki minst hjá veitarum av tænastum til oljuvinnuna.

Hetta hevur fingið stjóran á norska Petroleumstilsynet, Anne Myhrvold, til at siga at hon óttast at oljuvinnan kann verða rakt av fleiri óhappum.

- Eg óttist at feløgini ikki heilt hava skilt avleiðingarnar sparingarnar kunnu fáa, sigur hon í samrøðu við NRK.

Tað hon serliga óttast er at sparingarnar kunnu hava við sær manglandi viðlíkahald, og at tað kann gera at óhapp henda.

- Ja, í ringasta fóri kunnu vit fáa eina álvarsliga vanlukku, men et óttist eisini fleiri smærri óhapp, sigur hon.

Fakfeløgini óttast at oljufeløgini kunnu koma í eina støðu har tey hava spart burtur neyðugt eftirlit, men hetta vísir felagið hjá oljufeløgunum, Norsk olje og gass, aftur. Tey vísa á at oljufeløgini hava eina ábyrgd, og fylgja tey ikki lógarkrøvunum og tryggja at trygdini er uppá pláss, so kunnu tey ikki halda fram við virkseminum.